## Undan Íslandi við 100.000 pundum

Sørvágur: West Freezer (myndin) landaði í gjár til Landingarmiðstøðina í Sørvági, skrivar heimasíðan www.joanisnielsen.fo. Teir hava 100.000 pund, harav 40.000 pund eru brosma, eftir at hava roynt undir Íslandi síðani 4. apríl. West Freezer fer nýggjan túr sunnudagin. Tá verður aftur farið undir Ísland at royna.



## Hvalamenn fyrireika seg

Vanliga plaga íslendsku hvalabátarnir at byrja veiðitíðina í mai, men enn hava bátarnir ikki fingið at vita, hvussu stóra kvotu teir fáa í ár. Kortini eru bátarnir farnir at rigga til. Ein bátur hevur boðað frá, at hann fer út miðskeiðis í næsta mánað, og tveir aðrir hava gjørt av at fara út mitt í summar. Í ár er tað kjøtvirkið Esja, sum tekur ímóti tvøstinum frá hvalabátunum, og gongst sum ætlað, kemur tað fyrsta í handlarnar um mánaðarskiftið mai-juni.

# Fíggjaravkast bjargaði Tryggingarfelagnum

**Úrslitið í fjør hjá Tryggingarfelagnum Føroyar var tað ringasta nakrantíð. Hetta skyldast serliga eldsbrununum umborð á Hercules og Athenu. Men takkað verið góðum fíggjaravkastum upp á partabrøv royndist árið hjá móðirfelagnum TF Holding 16,3 mió. krónur betur enn í 2006**

ÁRSROKNSKAPUR

*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Árið í fjør var tað vánaligasta tryggingarárið fyri Tryggingarfelagið Føroyar nakrantíð. Men hóast hetta so gjørdist úrslitið hjá móðirfelagnum, TF Holding, 16,3 mió. krónur betur í 2007 enn í 2006. Fyri skatt hevði TF Holding eitt avlop á 145,2 mió. krónur samanborið við 99,6 mió. krónur í 2006, og aftaná skatt gjørdist úrslitið 115,9 mió. krónur. Hetta er sum vera man eisini er úrslitið hjá Ognarfelagnum Tryggingartakaranna, hvørs virksemi einans er at eiga partabrøv í TF Holding P/F.

Men tað var ikki Tryggingarfelagið Føroyar, ið háløaði vinningin í hús fyri TF Holding P/F í 2007. Árið gjørdist nevniliga tað ringasta í 10 ára longu søgu felagsins, og hetta komst serstakliga av álvarsama eldsbrunanum umborð á Hercules tann 21. apríl 2007, og eldinum umborð á systirskipinum Athenu bert góðar tveir mánaðar seinni.

Men hvussu ber tað so til, at úrslitið hjá móðirfelagnum TF Holding P/F kortini gjørdist 16,3 mió. krónur betur í 2007 enn í 2006?

- Hetta komst av fíggjaravkastinum, sum var betri í 2007 enn í 2006. Vit eru í tí hepnu støðu at hava fleiri bein at standa á, og í hesum føri var tað íløguvirksemi, sum bjargaði okkum í fjør, sigur Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

Tað vóru serliga partabrøv í børsskrásettum fyritøkum, sum háløaðu vinningin heim í 2007.

### Týðandi føroyskur íleggjari

TF Holding P/F er ein týðandi íleggjari í Føroyum og hevur sett pening í fleiri verkætlanir í 2007. Samanlagt setti felagið yvir 100 mió. krónur í føroyskar fyritøkur í 2007. Hetta eru fyritøkur, ið bæði virka í Føroyum og uttanlands. Talan er um fyritøkur sum Formula International, ið TF Holding setti pening í saman við Føroya Tele, JFK í Grønlandi, Data Quality, Atlantic Airways, Statoil, og umfígging av Smyril Line.

Men hvat er tað, sum hevur fingið TF Holding at seta pening í hesar fyritøkurnar, serliga tær, ið virka uttanlands?

- Vit meta tað vera áhugavert at brúka føroyska serfrøði og fara uttanlands við henni. Enn eru íløgurnar ungar, so ov tíðliga er at siga, hvussu tær fara at roynast. Men vit vænta okkum nógv av teimum, sigur Gunnar í Liða og heldur fram:

- Vit trúgva upp á Atlantic Airways, sum er einasta føroyska flogfelagið, somuleiðis trúgva vit upp á Statoil. JFK í Grønlandi er ein nýggj og spennandi verkætlan, sum er tengd at større vága, men eisini større potentiellum avkasti. Harafturat hevur TF Holding keypt seg inn í Injector, sum mennir eina áhugaverda orkusparandi skrúvu, greiðir Gunnar í Liða frá.

Hann leggur afturat, at tað er ein partur av strateginini hjá TF Holding at kanna møguleikar fyri at seta pening í verkætlanir, og at hendan strategiin serliga vendir sær móti føroyskum verkætlanum.

- Um vit seta pening í útlendskar fyritøkur, so er einans talan um børsskrásettar fyritøkur. Vit kenna størstu ábyrgdina í Føroyum, sigur hann.

### Endurtryggingarfelag á Guernsey

TF Holding eigur seks dóttirfeløg við 100 prosentum, harímillum endurtryggingarfelagið Faroe Insurance Company Guernsey Ltd. við einari eginogn uppá 238,6 mió. krónur.

Hví er hetta endurtryggingarfelagið skrásett á Guernsey?

- Í 2002 fóru vit at hyggja eftir møguleikum at eksponera okkara eginogn í egið felag í staðin fyri bert at endurtryggja okkum í útlendskum feløgum. Vit kannaðu eftir, hvar bestu lógarkarmarnir funnust fyri at gera hetta og komu fram til, at Guernsey var rætta staðið. Har er lógarverkið nevniliga skraddaraseymað til slíkar tryggingar, nevndar captives, greiðir Gunnar í Liða frá.

Stovnsfæið í Faroe Insurance Company Guernsey Ltd. í 2003 var 165 mió. krónur, men er nú vaksið til 238,6 mió. krónur. Hesin vøksturin á 73,6 mió. krónur er sostatt peningur, sum hevði farið á útlendskar hendur, um TF Holding ikki hevði stovnað sítt egna endurtryggingarfelag.

Tryggingarfelagið Føroyar er tó eisini endurtryggjað hjá øðrum útlendskum feløgum, og er hetta ein trygd, tá óvanliga stórir tryggingarskaðar henda – eitt nú skaðarnir hjá verksmiðjutrolarunum Hercules og Athenu í fjør.




*Bygnaðurin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Ognarfelag Tryggingartakaranna eigur øll partabrøvini í TF Holding P/F, sum eigur 100 prosent av partabrøvunum í teimum 6 dóttirfeløgunum í niðastu røð. Vístu upphæddirnar eru eginpeningur við árslok 2007.*

# Tryggingargjøld hækka

**Sjóvartryggingarnar eru hækkaðar eini 10 prosent í miðal. Men eisini sethúsaeigarar og bileigarar kunnu síggja fram til økt tryggingargjøld. Hesi fara at hækka upp í 10-15 prosent í næstum**

TRYGGING

*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Hóast sjóvartryggingar hækkaðu um 10 prosent um árskifti, so eru sethúsa-, innbús- og biltryggingar ikki hækkaðar enn hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Men her talan um ”stille før stormen”, tí felagið hevur longu boðað frá, at tað fer at hækka hesar tryggingar í næstum.

Gunnar í Liða, stjóri, sigur, at Tryggingarfelagið hevur ikki havt nakra prístillaging í mong harrans ár, og at tíðin nú er komin til at fremja tillagingar, sum hann tekur til. Hann vísir á, at bilumvælingar eru vorðnar munandi dýrari seinastu árini, og at hetta fer at síggjast aftur í tryggingargjøldunum.

- Vit noyðast at taka eina generella príshækking, sum fer at liggja um eini 10-15 prosent fyri tær tryggingar, sum hækka mest, sigur Gunnar í Liða.

Tá tað kemur til sethúsa- og innbústryggingar, so fara príshækkingarnar fyri eini miðal sethús at liggja um eini 20-30 krónur eyka um mánaðin. Gunnar í Liða heldur ikki, at hesar hækkingar eru so ógvusligar, at tær fara at ”koppa” nakrari fíggjarætlan. Spurdur um hann ikki er bangin fyri, at útlendsk tryggingarfeløg koma og bjóða Tryggingarfelagnum Føroyar av, nú tryggingarlóggávan verður liberaliserað enn einaferð, sigur hann:

- Vit hava sjálvandi hetta í huga, men vit eru ikki bangin fyri útlendskari kapping. Vit bæði eru og koma at vera fult kappingarfør við onnur feløg, sigur hann.

### Hercules og Athena ikki orsøk til hækking

Um ársskiftið hækkaðu sjóvartryggingarnar umleið 10 prosent í miðal. Gunnar í Liða sigur, at talan hevur verið um ymsar hækkingar fyri ymsar tryggingar, men at eitt miðaltal á 10 prosent er á góðari leið.

Tann 21. apríl 2007 brendi verksmiðjutrolarin Hercules, og bert góðar 2 mánaðir seinni, tann 4. juli 2007, kom eldur í systirskipið Athenu. Saman við skaðagongdini annars í árinum hevur hetta merkt, at samlaðu bruttoskaðarnir hjá felagnum í 2007 vóru 536 mió. krónur, ið er munandi meira, enn felagið nakrantíð áður hevur havt. Endurtryggingin rindaði stóran part av skaðunum, men hóast eina dygga endurtrygging, so sást hetta eisini aftur á nettoskaðunum hjá felagnum, sum í 2007 gjørdust 185 milliónir krónur.

Ein kundi freistast til at trúð, at tað eru hesir skaðarnir, sum fingu Tryggingarfelagið at hækka gjøldini á sjóvartryggingum. Men sambært Gunnari í Liða er hetta ikki orsøkin.

- Tað er rætt, at tryggingarnar eru hækkaðar nakað, men tað er ikki orsakað av hesum. Vit royna ikki at lata einstakar hendingar ávirka tryggingargjøldini. Hinvegin komu vit fram til, at sjóvartryggingarnar vóru ov lágar frammanundan og valdu tí at hækka tær nakað, sigur Gunnar í Liða.